# Ræðist ikki Klitschko

Tann 20. juni verður HM-brak í tungvekt millum WBA-meistaran, Ruslan Chagaev, og Wladimir Klitchkov, sum er meistari hjá IBF og WBO. Kltischkov verður av fleiri mettur sum besti tungvektarin í heiminum, men hetta ræðir ikki Chagaev.
– Tá tú hevur vunnið á einum manni, sum er 213 cm høgur og vigar 145 kilo, so er Klitchkov ikki so stórur, sigur Chgaev, sum vann sítt heiti við at vinna á risastóra Nikolai Valuev. Chagaev er við sínum 185 sentimetrum nakað væl minni enn Klitchkov, sum er 198 sentimetrar.



# Button vann í Istanbul

Jenson Button og Brawn stevna beint móti gullinum í ársins útgávu av Formel 1. Kappingin hevur í seinastu verið órógvað av verkfalshóttanum frá koyrarunum, men hetta legði bretski Button lítið í í Istanbul. Stórtalentið hjá Red Bull, Sebastian Vettel, hevði annars Pole position, men Button fór skjótt framvið honum, og so var bara at halda leiðsluni allan vegin á mál. Button er nú á odda við 61 stigum. Barrichello á øðrum plássi hevur 35 stig.

# Liðið verður broytt

**Annar av U21-venjarunum, Heðin Askham, staðfesti eftir 0-4 tapi fyri Rumenia, at Føroyar høvdu møtt einum ótrúliga góðum liði, ið væl og virðiliga hevði munin. Men broytingar verður í føroysku liðuppstillingini til Russlands-dystin í annaðkvøld**

FÓTBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Har vóru ongar umberingar ella burturforkláringar, tá annar av føroysku U21-venjarunum, Heðin Askham, eftir dystin leygarkvøldið skuldi taka saman um dystin ímóti Rumenia.

– Eg haldið, at vit møttu einum ótrúliga góðum liði, og vit vóru næstan sundurspældir allan dystin á tamb. Okkara kjansur er altíð at organisera okkum burtur úr teimum trupulleikum, vit fáa í slíkum dystum, men hesa ferð var tað trupult, og teir vunnu fult uppiborið 1-0, segði hann.

Samstundis hevði hann hug til at hyggja frameftir og beinanvegin gera klárt til dystin ímóti Russlandi, sum er á skránni longu í annaðkvøld.

– Nú skulu vit koma víðari til næsta dyst, sum er ímóti einum líka truplum liði. vit skulu hava menninar klárar aftur og so vita, um vit kunnu fáa eitt ordiligt úrslit. Vit eru veikir mann til mann, so standa vit ikki kompakt, verða vit fullkomuliga niðurspældir, segði Heðin Askham.



*Annar av føroyskum venjarunum, Heðin Askham, var skjótur at staðfesta, at okkara menn høvdu møtt einum nógv betri liði*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

## Gera broytingar

– Tað er munurin á okkum og teimum, og vit mugu bara royna at gera tað so gott, sum tað ber til. Vit mugu trúgva uppá tað hvønn einasta dyst. Viðhvørt riggar tað og viðhvørt ikki, og í dag riggaði tað ikki.

Spurdur, um nakar av føroysku spælarunum skaraði framúr, staðfesti Heðin Askham, at fleiri av spælarunum gjørdu tað gott og arbeiddu hart. Men uttan annars at nevna nøvn, tók hann miðverjuna burturúr og segði, at hon gjørdi tað væl – hóast alt.

Og tá hann var spurdur, um hann og hin venjarin, Bill McLeod Jacobsen, fara at gera nøkur øðrvísi val í liðuppstillingini til Russlandsdystin í annaðkvøld, var heldur eingin ivi: – Ja, avgjørt!

# Bara nøktandi ta einu løtuna

**Liðformaðurin á U21-landsliðnum, Christian Restorff Mouritsen, helt tað vera nógv harðari og torførari at spæla ímóti Rumenia, enn tað vanliga er tað í Vodafonedeildini**

FÓTBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Besta føroyska løtan í dystinum leygarkvøldið var byrjanin á seinna hálvleiki, og ein av føroysku spælarunum, sum tá var við í nøgvum av tí, sum hendi frameftir, var liðformaðurin, Christian Restorff Mouritsen.

– Júst løtan fyrst í seinna hálvleiki, sum vardi í einar 10-15 minuttir, er tað einasta, sum eg eri nøgdur við. Vit byrjaðu annars øgiliga illa í fyrra hálvleiki, men komu betur inn í dystin. Samanumtikið eri eg tó ikki nøgdur við innsatsin, segði hann.

– Sjálvur eri eg nøgdur, tí eg eri ikki í 100 prosents formi enn, men gjørdi tó mítt besta. Tað er bara stórur munur á at spæla her og so at spæla í Vodafonedeildini, tí hetta var nógv harðari og torførari.

Christian Restorff Mouritsen ásannaði somuleiðis, at rumenarnir vóru nógv skjótari og eitt nú vunnu allar ivabóltarnar.

– Vit vóru snøgt sagt ov sløvir og seinir í fyrra hálvleiki, men tað kann gerast nógv betri. Her og nú er mótið einki serligt undan Russlandsdystinum, tí vit hava jú akkurát tapt 4-0, men vónandi verður tað betri, tá tann dysturin nærkast, segði liðformaðurin.



*Toppurin av U21-landsliðsfótbólti er á nógv hægri støði enn tað, sum tú kanst uppliva í Føroyum, staðfestir Christian Restorff Mouritsen*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

# Innsatsurin má vera betri

**Annar av miðverjunum, Pól Jóhannus Justinussen, heldur brúk vera fyri einum innsatsi, sum skal vera eitt lítið sindur betri, skal frægari úrslit fáast burturúr ímóti Russlandi í annaðkvøld**

FÓTBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Eftir dystin ímóti Rumenia leygarkvøldið fingu miðverjarnir, Rógvi Holm og Pól Jóhannus Justinussen, rós frá venjaranum, Heðini Askham. Og annar teirra, Pól Jóhannus, mátti eftir dystin bara staðfesta, at Rumenia var betra liðið:

– Teir spældu tekniskan fótbólt og vóru øgiliga kvikir og skjótir. Tað var eisini tað, sum teir vunnu uppá. Og so komu teir eisini á odda 1-0 við einum ótrúliga góðum skoti, tá bara eitt korter var farið, segði hann.

– Eg haldi, at vit vóru klárir, men at teir bara vóru tað betri enn vit. Tað mugu vit so bara góðtaka. Og hetta var jú á einum nógv hægri stigi, enn vit eru vanir við frá Vodafonedeildini.

Hóast Pól Jóhannus Justinussen ásannaði, at ein betri innsatsur krevst í annaðkvøld, tá russiska U21-landsliðið vitjar á ovara vølli í Gundadali, heldur hann okkurt vera, sum føroyska liðið kann betra.

– Helst fara vit at leggja okkum eftir sama spælinum, men kanska skulu vit royna at tora at hava bóltin meira. Og skulu vit hava eitt frægari úrslit ímóti Russlandi, krevst helst ein innsatsur, sum er eitt lítið sindur betri, segði hann.